INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

Føroya Kommunufelag
Heiðavegur 72
Postboks 73
600 Saltangará

10. mars 2005
Mál: 5099-005/05-2
Tygara skriv: 02-fkf
Viðgjørt: HIH

**Viðvíkjandi fyrispurningi um rindast skal eftirlønargjald av bíðiløn**

Samb. § 14 í kunngerð nr. 160 frá 21. desember 2001 um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini, fær fráfarin borgarstjóri borgarstjórasamsýning eftir ávísum reglum § 14 sigur einki um eftirlønargjald.

Eftirløn til borgarstjóra er ásett í § 13 har tað samstundis er ásett at eftirlønargjaldið verður veitt umframt samsýningina, og at tað er borgarstjórin ið fær hetta eftirlønargjald. Eftirlønin kemur sambært § 14 aftrat samsýningini, ið verður latin sambært § 10, meðan einki er ásett um eftirløn aftrat bíðilønini. Við støði í hesum metir Innlendismálaráðið at eftirlønargjaldið ikki er partur av sjálvari samsýningini, men verður veitt umframt tá ávísar treytir eru loknar, og at tað bert eru borgarstjórar ið kunnu fáa tílíkt gjald og tískil ikki skal veitast fráfarnum borgarstjórum ið fáa bíðiløn.

Vegna Innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarleiðari

Postboks 159 · 110 Tórshavn · Tlf 358080 · faks 358085 · imr@imr.fo · www.imr.fo